


# Statoil enn eitt loyvi í Arktis

**Jan Müller**

19.06.2014 - 18:42

Oljan.fo

Statoil hevur fingið eitt loyvi afturat at bora í arktiskum øki.

Norska oljustýrið kunnger, at Statoil og tess samstarvsfeløg hava fingið loyvi til enn eina royndarboring eystan fyri Svalbard. Hini feløgini í boringini eru Conoco Philips, OMV og Petoro.

Boristaðið er tað norðasta av sínum slagi í heiminum, og umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace hevur mótmælt, at feløgini sleppa at bora so langt norðuri. Greenpeace heldur tað vera burturvið, at feløg sleppa at bora eftir olju á einum staði, sum er bara 170 kilometrar frá náttúruverndarøkinum við Bjarnoynna.

Tá Statoil fekk tað fyrra loyvið í arktiska økinum, fóru limir í Greenpeace upp á pallin

Transocean Spitsbergen, men tey tóku seg av pallinum, tá løgreglan kom uppí.